# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Vit hava ikki havt nakað vørumerki, men nú royna vit at skapa eitt*

*Óli Hansen, liðformaður hjá NSÍ*

# HF og Støkk til HM

**Um vikuskiftið verður HM-kappingin í estetiskum fimleiki hildin í Salou í Spania**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verða kvinnuliðini hjá Havnar Fimleikafelag og Støkk, sum umboða føroysku litirnar í kappingini, har til samans 28 lið úr 12 londum taka lut.

Innleiðandi umfarið byrjar í dag klokkan 16. Tíggju tey bestu liðini kappast síðani í finaluni, sum verður leygardagin.

Tað verður neyvan so, at føroysku liðini vinna seg fram til finaluna. Til tess er støðið hjá fremstu londunum helst ov høgt, men greiða málið er at betra seg í mun til kappingina í fjør. Ta ferðina blívu HF og Støkk ávikavist nummar 23 og 24 av 26 liðum, og hesa ferð er so ætlanin at toga seg eitt ella tvey pláss longur upp á talvuna.

Á heimasíðuni hjá Havnar www.hf.fo, ber til at fylgja við úrslitunum, tá føroysku liðini fara at royna seg.



*Seinnapartin í dag fara føroysku umboðini at kappast í HM í estetiskum fimleiki*
*Mynd: Álvur Haralds*

# Pannukøkur við orku



*Landsliðið saman við biggjarbørnum dagin dystin móti Skotlandi*

Bíggjarbørn vóru fegin, tá fótbóltslandsliðið vitjaði í bygdini, tá teir tóku sær av løttum undan Skotlandsdystinum. Í heilsan, sum tey hava sent okkum, takka tey hjartaliga fyri hugnaløtuna saman við spælarunum, sum fingu sær pannukøkur í bygdini. Og kanska vóru tað júst pannukøkkurnar, sum góvu so stóra megi, halda tey. Sparkivøllur er annars gjørdur í Bø, og har halda tey, at hetta kundi verið eitt fínt stað hjá landsliðnum at havt venjingarlegu. Tað kundi eisini givið nakað betri mótstøðu, enn tey eru von við. Tí hóast pápparnir eisini plaga at sparka við, so halda tey ikki, at orkan hjá teimum er somikið góð, sum hon er hjá landsliðnum.

# Eingin brasiliumaður til GÍ

**Seinastu góðu vikuna hevur Leandro Temeroso da Silva royndarvant við GÍ. Felagið vildi kannað, hvørt talan var um ein spælara, sum kundi styrkja um álopspartin á liðnum. Royndarvenjingin er nú av, og tað er gjørt av, at sáttmáli verður ikki skrivaður við spælaran, sum altso fer aftur til Brasil**

## EPO-SIGURIN STRIKAÐUR

Bjarne Riis, sum vann Tour de France í 1996, stendur ikki longur sum vinnari av stóru súkklukappingini. Ørnin úr Herning viðgekk fyri tveimum vikum síðani, at hann nýtti doping, m.a. EPO, árinin 1993 til 1998, og tað hevur fingið leiðsluna fyri Tour'in at taka óvanliga stigið. Stjórin fyri Tour de France, Michel Prudhomme, sigur, at ein súkklari, sum hevur viðgingið seg sekan í doping, ikki kann standa í søgubókunum sum vinnari.

Altjóða súkklufelagið, UCI, heldur avgerðina vera hykleriska, sum tikið verður til.

- Navnið hjá Riis kann bert strikast, um Tour-leiðslan við vissu kann siga, at allir aðrir súkklarar vóru »reinir«, sigur UCI-forsetin, Pat McQuaid. '

Hjá UCI verður Riis ikki strikaður. Hetta tí hendingin er longur afturi í tíðini, enn átta ára revsimarkið fyri doping.